# VEGLEIÐING UM SAMTYKKI

Oktober 2020

1. útgáva

Dátueftirlitið

## Innihald


1. Hvat er eitt samtykki? ... 2
2. Krøvini til samtykki ... 3
   - 2.1. Nær skal samtykki fáast til vega ... 3
   - 2.2. Formkrøv ... 3
   - 2.3. Sjálvboðið samtykki ... 4
   - 2.3.1. Greiður skeivleiki millum partarnar ... 4
   - 2.3.2. Sundurbýti ... 8
   - 2.4. Nágreiniligt samtykki ... 10
   - 2.5. Kunnað samtykki ... 11
   - 2.5.1. Lágmarkskrav ... 11
   - 2.5.2. Kunningarskylda ... 12
   - 2.6. Greitt viljaboð ... 13
   - 2.6.1. Óvirkni ... 14
   - 2.7. Serlig krøv til samtykki ... 15
3. Rætturin til at taka aftur eitt samtykki ... 15
   - 3.1. Goyming av skjalprógvi fyri samtykki ... 17
4. Børn og samtykki ... 18
   - 4.1. Møguleikin hjá børnum at geva samtykki ... 18
   - 4.2. Samtykki frá børnum í sambandi við kunningarsamfelagstænastur ... 19
5. Tjekklisti ... 21

# 1. Hvat er eitt samtykki?

Samtykki, sambært dátuverndarlógini, er framsøgn um, at skrásetti hevur fingið eitt veruligt val og vald yvir, hvussu sínar upplýsingar skulu brúkast. Samtykki er ein av fleiri javnmettum viðgerðarheimildum, sum dátuábyrgdarin kann brúka við viðgerð av persónupplýsingum. Viðgerðarheimild verður eisini nevnd viðgerðargrundarlag.

Tað er avgerandi, at dátuábyrgdarin ger sær greitt, um samtykki er best hóskandi viðgerðargrundarlagið, ella um annað viðgerðargrundarlag hóskar betri. Dátuábyrgdarin eigur m.a. at umhugsa, hvørt tað veruliga vil verða gjørligt fyri skrásetta at taka sítt samtykki aftur, og hvørjar avleiðingar hetta vil føra við sær.

Um eitt samtykki ikki lýkur treytirnar í dátuverndarlógini, kann tað ikki vera viðgerðargrundarlag.

Í kassanum niðanfyri finnur tú allýsingina í dátuverndarlógini av einum samtykki. Gev gætur, at samtykki frá skrásetta skal samsvara hesi allýsing.

Harafturat er tað eitt krav, at dátuábyrgdarin kann vísa á, at skrásetti hevur givið samtykki til viðgerð av sínum persónupplýsingum. Tað er dátuábyrgdarin, sum hevur próvbyrðuna fyri, at skrásetti hevur givið tað neyðuga samtykki. Harumframt er tað ein treyt, at um samtykki frá skrásetta verður givið í skrivligari váttan, sum eisini viðvíkur øðrum viðurskiftum, skal ein áheitan um samtykki leggjast fram á ein hátt, sum týðiliga kann skiljast frá hinum viðurskiftunum í váttanini. Áheitanin skal vera á einum greiðum og einføldum máli.

Tað er eisini eitt krav, at skrásetti, áðrenn samtykki verður givið, skal upplýsast um, at samtykki kann takast aftur. Omanfyri nevndu treytir skulu allar vera loknar, áðrenn eitt samtykki er galdandi eftir dátuverndarlógini.

# 2. Krøvini til samtykki

## 2.1. Nær skal samtykki fáast til vega

Samtykki frá skrásetta skal fáast til vega, áðrenn dátuábyrgdarin fer undir at viðgera tær upplýsingar, sum samtykki viðvíkur.

Áðrenn viðgerðina, eigur dátuábyrgdarin fyrst at meta um, um samtykki er tað viðgerðargrundarlag, sum hóskar seg best. Um samtykki hóskar seg best til viðgerðina, og dátuábyrgdarin metir, at samtykki livir upp til krøvini í dátuverndarlógini, skal samtykki fáast til vega, áðrenn viðgerðin av persónupplýsingum verður sett í verk.

## 2.2. Formkrøv

Eitt samtykki kann bæði verða givið munnliga, skrivliga og talgilt. Avgerandi er, at váttanin ella gerðin hjá skrásetta týðiliga boðar frá, hvat skrásetti hevur í hyggju. Eitt samtykki kann tí ikki gevast tigandi ella óbeinleiðis.

Harafturat skal dátuábyrgdarin kunna vísa á, at skrásetti hevur givið sítt samtykki til viðgerðina av persónupplýsingunum. Dátuábyrgdarin skal eisini kunna vísa á, hvat samtykkið fevnir um. Eitt samtykki eigur tí, so vítt sum gjørligt, at gevast skrivliga ella á annan hátt, ið ger tað møguligt hjá dátuábyrgdaranum at vísa á, at samtykki er givið. Er samtykki givið munnliga kunnu møguligar mannagongdir, tá samtykki verður fingið til vega, nýtast sum skjalprógv.

Kann dátuábyrgdarin ikki vísa á, at hann hevur fingið samtykki frá skrásetta, er avleiðingin, at samtykkið ikki kann metast at vera heimilað og kann tí ikki vera eitt lógligt viðgerðargrundarlag.

## 2.3. Sjálvboðið samtykki

Eitt samtykki skal vera sjálvboðið. Endamálið við einum samtykki er at geva skrásetta eitt val og ikki minst vald yvir sínum egnu persónupplýsingum. Eitt samtykki verður tí ikki mett at vera givið sjálvboðið, um skrásetti ikki hevur eitt veruligt ella frítt val. Eitt samtykki kann tí ikki verða givið undir tvingsli. Hetta er galdandi, óansæð um tað er dátuábyrgdarin, ella annar, sum tvingar skrásetta.

Ein og hvør formur av óhóskandi trýsti ella ágangi mótvegis skrásetta, hevur við sær, at samtykki er óheimilað.

**Dømi 1**

Eitt privat ítróttarfelag biður limur sínar um at geva samtykki til at fáa myndir tiknar av teimum fyri at leggja myndirnar út á heimasíðu felagsins.

Limirnir metast at hava eitt veruligt og frítt val, so leingi noktan ikki hevur neiligar avleiðingar (t.d. um ein limur verður koyrdur úr felagnum). Ítróttarfelagið eigur annars at umhugsa, um samtykki er best hóskandi viðgerðargrundarlag, ella um felagið kundi lagt myndirnar út á heimasíðuna, grundað á annað viðgerðargrundarlag, t.d. § 8, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini.

### 2.3.1. Greiður skeivleiki millum partarnar

Í samband við spurningin um sjálvboðið samtykki eigur dátuábyrgdarin at hava í huga, um tað er greiður skeivleiki millum dátuábyrgdaran og skrásetta. Eitt samtykki verður vanliga ikki sæð sum sjálvboðið, um tað er ein greiður skeivleiki millum skrásetta og dátuábyrgdaran.

*Almennir myndugleikar*

Hetta kann vera, um dátuábyrgdarin er ein almennur myndugleiki, og tann skrásetti søkir um eina almenna veiting hjá myndugleikanum. Skrásetti vil í hesum førinum ofta ikki hava aðrar møguleikar enn at geva samtykki til viðgerðina av upplýsingum, um skrásetti vil hava veitingina.

Ein almennur myndugleiki kann tí í mongum førum ikki kunna viðgera persónupplýsingar við samtykki sum viðgerðargrundarlagi.

Almennir myndugleikar eru til tíðir lógarbundnir av treytum um “samtykki” frá borgaranum. Í slíkum førum skal myndugleikin kortini hava í huga, at hóast lógin sigur, at “samtykki” er kravt, merkir hetta ikki neyðturviliga tað sama sum eitt samtykki, sum vit kenna tað í dátuverndarlógini. Eitt sovorðið “samtykki” vil oftani vera ein ábyrgdarregla (garantiforskrift) fyri borgaran, men er ikki sjálvt viðgerðargrundarlagið. Viðgerðargrundarlagið er í slíkum førum ofta § 8, stk. 1, nr. 5, í dátuverndarlógini (myndugleikaútinnan).

Um tað ikki hevur týdning fyri myndugleikans viðgerð av eini umsókn um veiting ella einum loyvi til skrásetta, kann samtykki nýtast sum viðgerðargrundarlag. Tað kann t.d. vera, um ein borgari ynskir at taka av einum tilboði frá kommununi um at fáa upplýsingar á teldupost ella SMS um vegarbeiði í kommununi.

*Starvsrættarlig viðurskifti*

Viðgerð av persónupplýsingum í starvsrættarligum viðurskiftum kann fara fram við samtykki sum viðgerðargrundarlag, um samtykkið lýkur treytirnar í dátuverndarlógini.

Í starvsrættarligum viðurskiftum er tó vanliga ein skeivleiki millum arbeiðsgevara og starvsfólk. Ein arbeiðsgevari eigur tí at hava í huga, um samtykkið frá starvsfólkinum veruliga er framsøgn fyri valinum hjá viðkomandi ella um samtykkið er givið við ótta fyri stórum neiligum fylgjum. Í hesum sambandi skal leggjast dentur á, um samtykkið frá starvsfólkinum er neyðugt ella, um arbeiðsgevarin kann nýta eitt betri hóskandi viðgerðargrundarlag.

**Dømi 2**

Ein fyritøka hevur eina telefonbók yvir síni starvsfólk. Telefonbókin er tøk fyri starvsfólkini gjøgnum intranetið í fyritøkuni. Fyri at betra um samskiftið millum starvsfólkini, ynskir leiðslan at seta vangamyndir fyri hvørt starvsfólk í telefonbókina. Leiðslan spyr tí hvørt starvsfólk um samtykki til at seta vangamynd í telefonbókina. Leiðslan ger greitt, at tað er sjálvboðið, og um starvsfólkið ikki ynskir at geva sítt samtykki, hevur hetta ikki neiligar avleiðingar fyri starvsfólkið.

Starvsfólksins samtykki vil verða mett sum sjálvboðið.

Um leiðslan hevur upplýst, at vantandi luttøka fær neiligar avleiðingar, um starvsfólkini ikki geva samtykki, vil samtykki ikki vera sjálvboðið.

Leiðslan kann harumframt umhugsa, um samtykki er best hóskandi viðgerðargrundarlag av persónupplýsingunum.

**Dømi 3**

Í sambandi við upptøku av einum lýsingarfilmi fyri eina kommunu, skal eitt upptøkulið filma borgarstjóran, meðan hann vísir runt og greiðir frá, hvussu fyrisitingin hevur innrættað partar av kommunuskrivstovuni. Liðið skal fylgja eini ávísari leið, meðan upptikið verður, og fyrisitingin spyr starvsfólkini, sum dagliga arbeiða á kommunuskrivstovuni um samtykki til, at tey møguliga kunnu gerast partur av upptøkunum. Tað fær ongar neiligar fylgjur fyri tey starvsfólk, sum ikki ynskja at verða við á upptøkunum, og sum tí ikki geva teirra samtykki. Hesi starvsfólk sleppa at arbeiða á øðrum plássi, við somu tólum og skrivstovuútbúnaði, sum tey vanliga nýta, meðan upptøkurnar fara fram.

Starvsfólksins samtykki vil verða mett sum sjálvboðið.

Um leiðslan hevur upplýst, at vantandi luttøka vil fáa neiligar avleiðingar, um starvsfólkini ikki geva samtykki, vil samtykki ikki vera sjálvboðið.

*Avtala treytað av samtykki*

Tá metast skal, um eitt samtykki er sjálvboðið, skal atlit takast til, um útinnan av eini avtalu, t.d. um tænastuveiting, er gjørd treytað av samtykki til viðgerð av persónupplýsingum, sum ikki eru neyðugar fyri at útinna avtaluna.

Eitt samtykki til viðgerð av persónupplýsingum er sostatt ikki sjálvboðið, um keyp av eini vøru ella veiting er treytað av samtykki, hóast viðgerðin av persónupplýsingunum er óneyðug fyri vøruna ella veitingina.

Sum dømi 4 vísir, eigur dátuábyrgdarin at hava í huga, hvørjar upplýsingar eru neyðugar fyri at útinna avtaluna. Dátuábyrgdarin kann tí umhugsa, um tað finst eitt betri hóskandi viðgerðargrundarlag enn samtykki.

**Dømi 4**

Ein elektronikkhandil á alnetinum setur sum treyt við keyp av fartelefon, at kundin samtykkir, at elektronikkhandilin kann deila kundans upplýsingar við telefonfeløgini í landinum. Deiling fer fram við tí endamáli, at feløgini kunnu senda kundunum tilfar um lagalig tilboð uppá ymisk hald. Deiling av upplýsingum er ikki neyðug fyri keypið av fartelefonini.

Kundans samtykki vil ikki verða mett sum sjálvboðið, um tað er ein treyt fyri keypið av telefonini. Elektronikkhandilin kann fegin biðja um samtykki til slíka deiling av kundans upplýsingum, men kundin skal hava møguleika fyri at nokta samtykki og samstundis varðveita møguleikan fyri at keypa vøruna.

*Vansi ella skaði*

Ein dátuábyrgdari kann í vissan mun eggja skrásetta til at geva samtykki við at knýta fyrimunir í eitt samtykki. T.d. kann skrásetti fáa limatilboð, avsláttur og aðrar fyrimunir, um skrásetti teknar seg sum lim hjá einum handli, við teirri treyt at fáa lýsingar frá handlinum. Hetta kann eggja kundan til at geva samtykki til viðgerð av sínum upplýsingum. Fyrimunirnir útiloka ikki, at samtykkið kann metast sum sjálvboðið.

Tó er týdningarmikið at hava í huga, um vantandi samtykki úrslitar í neiligum avleiðingum fyri skrásetta, t.d. eykakostnað.

**Dømi 5**

Ein kundi heldur eitt tíðindabræv frá einum skóhandli við vanligum tilboðum og avsláttrum. Skóhandilin vendir sær til kundan og heitir á viðkomandi um at geva samtykki til, at fleiri upplýsingar um keypisertokka (købepræferencer) verða fingnar til vega, fyri at handilin kann smíða tilboðini eftir kundans keypisertokka. Hetta skal gerast út frá einum søguligum yvirliti yvir keyp hjá kundanum ella einum spurnarblaði, sum er sjálvboðið at fylla.

Um kundin seinni tekur sítt samtykki aftur, vil viðkomandi aftur fáa tey vanligu tilboðini og avsláttur. Her er ikki talan um skaða.

### 2.3.2. Sundurbýti

Um ein dátuábyrgdari vil viðgera persónupplýsingar til fleri endamál, skal skrásetti frítt kunna velja, hvørji endamál, skrásetti gevur samtykki til.

Eitt samtykki er ikki givið sjálvboðið, um mannagongdin at fáa samtykki, ikki gevur skrásetta møguleika fyri at geva serstakt samtykki til ymisku viðgerðirnar av persónupplýsingum og harvið hevur við sær, at skrásetti skal geva samtykki til allar viðgerðirnar. Samtykkið skal kunna sundurbýtast.

Um ein viðgerð av persónupplýsingum tænir fleiri endamálum, skal dátuábyrgdarin fáa til vega serstakt samtykki fyri hvørt einstakt endamál. Dátuábyrgdarin skal sostatt geva skrásetta møguleika fyri at samtykkja til eitt endamál, samstundis sum skrásetti ikki gevur samtykki til onnur endamál. Í gerð kann hetta t.d. skipast á tann hátt, at dátuábyrgdarin útflýggjar eina váttan til skrásetta, har skrásetti kann avmerkja hvørji viðgerðarendamál, viðkomandi vil geva samtykki til.

**Dømi 6**

Ein klædnahandil á alnetinum biður í somu áheitan kundarnar um at samtykkja:

- at upplýsingar viðgerast í samband við vøruútbering av umbidnari vøru
- at upplýsingar verða nýttar til at senda kundunum lýsingartilfar gjøgnum teldupost
- at upplýsingar verða deildar við aðrar fyritøkur

Samtykkið er orðað so, at kundin antin samtykkir til alt ella einki.

Samtykkið er ikki sundurbýtt, tí tað ikki er gjørligt hjá kundanum at geva serstakt samtykki til hvørt viðgerðarendamál. Í hesum førinum eigur serstakt samtykki at fáast til vega til hvørt endamál. Fyritøkan eigur eisini at hugsa um, um annað viðgerðargrundarlag enn samtykki er betri hóskandi og gjørligt at nýta, tá tað snýr seg um vøruútbering.

**Dømi 7**

Ein bilasøla gevur sínum kunda eina samtykkiváttan við keyp av bili. Í hesi samtykkiváttan hevur kundin møguleika fyri at merkja av hvørt einstakt endamál, sum viðkomandi ynskir at geva samtykki til. Kundin kann geva samtykki til hesi tilboð:

- At fáa tilboð gjøgnum teldupost um eykalutir, tilhoyr, og annað til bilin
- At luttaka í spurnablaðkanning
- At fáa áminningar um tíðir á verkstaðnum og onnur kundatænastuboð

Av tí, at kundin hevur møguleika fyri at velja hvørt viðgerðarendamál, sum samtykt verður til, er samtykkið sjálvboðið.

## 2.4. Nágreiniligt samtykki

Eitt samtykki skal vera nágreiniligt. Tað má tí ikki vera orðað á ein almennan hátt ella uttan greitt at lýsa endamálini við viðgerðini av persónupplýsingum og hvørjar persónupplýsingar, ið verða viðgjørdar. Eitt samtykki skal við øðrum orðum gerast ítøkiligt so, at tað klárt og týðiligt fatast, hvat samtykki snýr seg um.

Kravið um nágreiniligt samtykki hongur saman við meginregluni um endamálsavmarking, sum merkir, at persónupplýsingar altíð skulu fáast til vega til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál (t.d. almenn myndugleikaútinnan ella útinnan av avtalu í privata geiranum) og ikki seinni kunnu viðgerast á ein hátt, sum er í ósamsvari við hesi endamál.

**Dømi 8**

Við tilmelding, verða kundar hjá einum fitness-sentri bidnir um samtykki til at fáa eitt mánaðarligt tíðindabræv. Eigarin hevur eisini ein handil á alnetinum, har hann selur venjingarmaskinur. Kundarnir verða við tilmelding samstundis bidnir um at geva samtykki til at fáa marknaðarføringstilfar frá alnets-handlinum. Samtykki-frymilin er skipaður soleiðis, at kundin skal seta kross í ein punt fyri at fáa tíðindabrævi og ein annan punt fyri at fáa marknaðarføringstilfar.

Samtykki vil í hesi støðuni vera serstakt og lýkur samstundis kravið um sundurbýting.

Tann skrásetti skal altso geva samtykki til serstøk endamál við viðgerðini. Harafturat skal dátuábyrgdarin upplýsa skrásetta um, hvørjar upplýsingar verða viðgjørdar til hvørt endamál.

Ynskir ein dátuábyrgdari, sum viðger upplýsingar við samtykki sum viðgerðargrundarlagi til eitt endamál, seinni at nýta upplýsingarnar til onnur endamál, skal dátuábyrgdarin fáa til vega nýtt samtykki, sum umfatar nýggja endamálið.

Dátuábyrgdarin skal eisini hava í huga, hvussu ein samtykki-frymil skal sniðgevast. Um váttanin eisini viðvíkur øðrum viðurskiftum – t.d. keyps- og handilstreytum í samband við keyp av eini tænastuveiting – skal áheitanin um samtykki greitt kunna skiljast sundur frá hinum viðurskiftunum.

Áheitanin um samtykki skal samstundis leggjast fram á ein lætt skiljandi og lætt atkomuligan hátt og á einum greiðum og einføldum máli, ið er egnað til málbólkin. Vanliga er nokk við *eini* áheitan, hóast málbólkurin bæði er børn og vaksin, um áheitanin er skillig fyri børn.

## 2.5. Kunnað samtykki

Samtykki skal vera kunnað. Tað merkir, at tann, ið samtykkir, skal hava fingið so mikið av upplýsingum, at viðkomandi er fullgreitt vitandi um, hvat samtykki fevnir um, og hvørjar fylgir eru av at geva samtykki. Dátuábyrgdarin skal geva skrásetta nóg mikið av upplýsingum, at skrásetti kann taka avgerð á kunnaðum grundarlagi.
Einki formkrav er til, hvussu hesar upplýsingar skulu gevast. Tað er sostatt møguligt at lúka kravið skrivliga, munnliga og talgilt.

### 2.5.1. Lágmarkskrav

Kunningin til skrásetta skal í øllum førum fevna um:

- Dátuábyrgdarans samleika
- Endamálið við ætlaðu viðgerðini

- Hvørjar upplýsingar, sum viðgerast
- Rættin til at taka samtykki aftur

Dátuábyrgdarin skal altíð laga kunningina til støðuna og skal tí vita við vissu, hvørjar persónupplýsingar skulu fáast til vega og, hvussu tær viðgerast, endamálið við viðgerðini, møguligir móttakarar av upplýsingunum og hvussu skrásetti kann nýta síni rættindi viðvíkjandi innliti, afturtøku av samtykki o.s.fr.

Avgerandi er at tryggja gjøgnumskygni fyri skrásetta og at tryggja eina lógliga og rímiliga viðgerð av upplýsingunum.

**Dømi 9**

Ein dátuábyrgdari gevur hesa kunning í sambandi við áheitan um samtykki:

- *Vit viðgera tínar persónupplýsingar fyri at betra um góðskuna av hesi tænastuveiting*
- *Í summum førum geva vit tínar upplýsingar til triðjapartar fyri at kunna bjóða tær eina betri tænastu*
- *Við framhaldandi nýtslu av hesi tænastu gevur tú samtykki til viðgerð av persónupplýsingum. Vit skráseta m.a. navn, teldupostadressu, aldur og aðrar viðkomandi upplýsingar*
- *Hesin persóndátupolitikkur kann verða broyttur. Vitja okkara heimasíðu regluliga fyri at halda teg dagførdan*

Hendan kunningin er sera yvirskipað og víðfevnd. Kunningin gevur ikki nóg neyva kunning um endamálið við ætlaðu viðgerðini.

### 2.5.2. Kunningarskylda

Í nógvum førum verður samtykki fingið til vega samstundis sum persónupplýsingar um skrásetta verða savnaðar. Kravið um kunning við áheitan um samtykki fellur tí ofta saman við vanligu kunningarskylduni hjá dátuábyrgdaranum.

Tað kann tí viðmælast, at dátuábyrgdarin setur kunningina til skrásetta saman á ein slíkan hátt, at kunningarskyldan verður hildin samstundis.

Fyri at tryggja gjøgnumskygni fyri skrásetta, skal áheitanin um samtykki vera sundurbýtt frá keyps- og handilstreytum o.l. (sí dømi 9).

## 2.6. Greitt viljaboð

Samtykki frá skrásetta skal vera eitt greitt viljaboð. Hetta merkir, at eingin ivi skal vera um, hvat skrásetta meinar við samtykkinum.

Eitt greitt viljaboð kann vera, at skrásetti við eini fráboðan ella við eini virknari gerð á greiðan hátt boðar frá, at viðkomandi gevur samtykki til, at sínar upplýsingar verða viðgjørdar.

Eitt greitt viljaboð kann fráboðast skrivliga, við at krossa ein punt av á eini heimasíðu ella við at velja viðkomandi tøkniligar stillingar á kunningarsamfelagstænastum t.d. Facebook, Snapchat og Instagram.

Aðrar virknar gerðir kunnu eisini vera mettar sum greið viljaboð, treytað av, at tað er greitt og týðiligt, at skrásetti hevur givið sítt samtykki. Eitt alment samtykki av vanligum treytum er ikki ein greið váttan, har skrásetti gevur samtykki til viðgerð av persónupplýsingum.

**Dømi 11**

Ein persónur fyllur eitt talgilt spurnablað um ítróttaráhugamál og sendir spurnablaðið inn talgilt.

Tá persónurin við endan á spurnarblaðnum trýstir á “send”, er hetta samtykki um, at tær uppgivnu upplýsingarnar kunnu brúkast til tey endamál, sum eru nevnd í spurnablaðnum, um tað frammanundan er greitt, at persónurin veit, at við at senda spurnarblaðið, samtykkir viðkomandi til, at upplýsingarnar verða viðgjørdar.

Eitt swipe, at vinka frammanfyri einum snildfonmyndatóli, at flyta snildfon sína runt við urinum ella í eini áttatals-rørslu kunnu vera hættir at geva samtykki, um øll neyðug kunning er givin skrásetta og tað er greitt, at rørslan merkir, at skrásetti samtykkir.

Tað kann vera nokk, at skrásetti góðtekur eina váttan um samtykki, ið er orðað frammanundan, um váttanin verður givin við eini virknari gerð, t.d. við at klikkja á ein punt, sum greitt kunnar skrásetta um, at gerðin úrslitar í samtykki til viðgerð av persónupplýsingum.

**Dømi 10**

Ein kundi í eini sølumiðstøð skrivar sítt navn og sín bústað á eitt oyðublað og leggur oyðublaðið í eina krukku fyri at luttaka í eini kapping um ókeypis biograf-atgongumerkir. Sølumiðstøðin stendur fyri kappingini. Oyðublaðið inniheldur kunning um m.a. endamálið við viðgerðini av upplýsingunum. Kunningin stendur ovast á oyðublaðnum, t.e. áðrenn kassarnar, sum kundin skal fylla. Harafturat er oyðublaðið sett soleiðis saman, at kundin skal seta kross í ein punt fyri at geva sítt samtykki til, at upplýsingarnar verða nýttar í lutakastinum.

Kundans gerð er ein greið váttan, sum týðiliga ger kunnugt eitt samtykki til, at sølumiðstøðin viðger kundans navn og bústað við tí endamáli at luttaka í kappingini. Kundans samtykki kann ikki toyggjast til onnur endamál, t.d. til, at sølumiðstøðin sendir marknaðarførslutilfar til kundan.

### 2.6.1. Óvirkni

Tøgn, frammanundan krossaðir puntar á heimasíðum ella óvirkni er ikki ein púra greið fráboðan og kann tí ikki vera eitt samtykki.

**Dømi 12**

Í samband við bílegging av einum vikublaðshaldi frá einum alnets-handli hjá einum útgevara, fær kundin á bíleggingarsíðuni ein teig at lesa, har tað stendur, at við at bíleggja haldið gevur kundin samstundis samtykki til, at útgevarin kann víðarigeva kundans upplýsingar til aðrar fyritøkur í samtakinum í samband við marknaðarføring. Út fyri teigin er ein puntur fyri samtykki, sum longu er krossaður av.

Hetta er ikki eitt gildugt samtykki, av tí, at punturin fyri samtykki longu er krossaður av, og kundin hevur tí ikki givið eitt virkið samtykki.

## 2.7. Serlig krøv til samtykki

Dátuverndarlógin setur í nøkrum førum serlig krøv til samtykki. Serliga strang krøv til samtykki eru galdandi, tá dátuábyrgdarin ætlar at viðgera viðkvæmar upplýsingar (t.d. upplýsingar um ættarslag ella etniskan uppruna, politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring ella yrkisfelagsligt tilknýti), tá automatiskar avgerðir skulu takast, og í sambandi við flutning av persónupplýsingum til eitt ótrygt triðjaland.

Í teimum førum, tá dátuverndarlógin afturat allýsingini endurtekur kravið um, at samtykki skal vera nágreiniligt (t.d. § 12, stk. 1, nr. 1), skal hetta skiljast sum ein eyka áminning til dátuábyrgdaran um, at tað í hesum førum ikki skal vera nakar ivi um, hvørt skrásetti hevur givið samtykki til viðgerðina.

Próvbyrðan fyri, at samtykki er givið, liggur hjá dátuábyrgdaranum, sum eigur at tryggja sær skjalprógv.

# 3. Rætturin til at taka aftur eitt samtykki

Skrásetti kann til eina og hvørja tíð taka sítt samtykki aftur. Tað er dátuábyrgdarans uppgáva at tryggja sær, at skrásetti kann taka sítt samtykki aftur á ein einfaldan og lætt atkomiligan hátt. Tað skal vera eins lætt at taka sítt samtykki aftur, sum at geva samtykki. Tó er tað ikki eitt krav at afturtøka skal fara fram á sama hátt, sum samtykkið upprunaliga varð givið.

Um eitt samtykki t.d. fæst til vega við einum einklum músaklikki, knappaborðstrýsti ella swipeið, eigur tann skrásetti at kunna taka sítt samtykki aftur á tilsvarandi einklan hátt. Um samtykki fæst til vega gjøgnum eina heimasíðu, eina app ella gjøgnum

teldupost, eigur tann skrásetti at kunna taka aftur sítt samtykki gjøgnum somu tøkniligu loysn.

**Dømi 13**

Við bílegging biður ein klædnahandil á alnetinum um samtykki til at senda teldupostar við góðum tilboðum og avsláttri upp á útvaldar vørur. Samtykki verður givið við at seta flugubein í ein punt. Kundin verður kunnaður um, at samtykki altíð kann takast aftur við at ringja til klædnahandilin millum 10:00 og 16:00.

Handilin livir ikki upp til kravið um, at tað skal vera líka lætt at taka aftur sítt samtykki, sum at geva tað. At taka aftur sítt samtykki í hesum førinum krevur eina uppringing í arbeiðstíð og er tí ikki líka ómakaleyst sum at seta kross í ein punt á eini heimasíðu

Tann skrásetti skal eisini hava møguleika at taka aftur sítt samtykki, uttan at tað er til skaða fyri viðkomandi. Hetta merkir m.a., at skrásetti skal kunna taka sítt samtykki aftur, uttan at gjalda eitt fyrisitingarligt gjald fyri tað.

Tann skrásetti skal vera kunnaður um, at eitt samtykki kann takast aftur og hvussu hetta kann fara fram, *áðrenn* samtykki verður givið. Er ikki nóg mikið av greiðari kunning givin um møguleikan at taka samtykkið aftur, kann samtykkið ikki metast at vera heimilað.

Um tann skrásetti velur at taka sítt samtykki aftur, ávirkar hetta ikki heimildina av tí viðgerð, sum er grundað á samtykki, áðrenn afturtøku. Afturtøka viðvíkur bert framtíðar viðgerð av upplýsingum hjá skrásetta.

Útgangsstøðið er, at dátuábyrgdarin skal halda uppat at viðgera peresónupplýsingarnar so skjótt sum gjørligt, um skrásetti tekur aftur sítt samtykki. Tað er týdningarmikið at hava í huga at goymsla av upplýsingum hjá skrásetta eisini er ein viðgerð, sum tí skal halda uppat við afturtøku av samtykki. Tó er hetta bert galdandi fyri tær upplýsingar, sum eru viðgjørdar við samtykki sum viðgerðargrundarlagi og ikki upplýsingar, har viðgerðargrundarlagið er eitt annað, t.d. ein avtala millum dátaábyrgdaran og tann skrásetta.

Tann skrásetti hevur rætt til at fáa upplýsingar um seg sjálvan strikaðar, tá eitt samtykki *er tikið aftur*. Hóast tann skrásetti ikki sjálvur biður um hetta, eigur dátuábyrgdarin at taka støðu til spurningin um at strika upplýsingarnar, um viðgerðargrundarlagið einans er samtykki.

Dátuábyrgdarin kann sum útgangsstøði ikki broyta viðgerðargrundarlag, um skrásetti tekur aftur sítt samtykki. Tað er tí sera týdningarmikið, at dátuábyrgdarin umhugsar, um samtykki er best hóskandi viðgerðargrundarlag, áðrenn hann fær eitt samtykki til vega.

Í nøkrum førum er tað tó gjørligt at halda á fram við eini viðgerð, hóast skrásetti hevur tikið sítt samtykki aftur. Ein framhaldandi viðgerð kann fara fram, um hon er rímilig mótvegis skrásetta.

Hevur dátuábyrgdarin eitt annað lógarheimilað viðgerðargrundarlag enn samtykki við einum sjálvstøðugum endamáli, t.d. goymsla av upplýsingum í samband við at halda reglurnar um bókføring, kann henda viðgerðin eisini framhaldandi fara fram.
Tað er kortini ikki rímiligt ella gjøgnumskygt fyri skrásetta, um dátuábyrgdarin seinni grundar viðgerðina á heimilað áhugamál, tá eitt samtykki er tikið aftur. Í hesi støðuni átti dátuábyrgdarin at hava nýtt hetta viðgerðargrundarlag upprunaliga í staðin fyri samtykki.

Heldur viðgerðin fram á øðrum viðgerðargrundarlagi, skal skrásetti hava kunning um viðgerðargrundarlag, endamál o.s.fr.

## 3.1. Goyming av skjalprógvi fyri samtykki

Um ein viðgerð er grundað á samtykki, skal dátuábyrgdarin kunna vísa á, at skrásetti hevur givið samtykki.

Tá viðgerðin heldur uppat, t.d. tí, at samtykki verður tikið aftur, eigur skjalprógvi fyri samtykki ikki at goymast longri enn neyðugt fyri at halda eina lógarheimilaða skyldu ella fyri, at eitt rættarkrav kann gerast galdandi ella verjast.
Spurningurin um, hvussu leingi skjalprógvið skal goymast, skal grundast á eina ítøkiliga meting.

Við eina møguliga framtíðar trætu um heintan ella gildi av einum samtykki, kann dátuábyrgdarin, um skjalprógvið fyri samtykkið er strikað, skjalprógva mannagongdirnar at fáa samtykki til vega og hvussu áheitan um samtykki (undir hesum ein møgulig samtykkiváttan)var, um tað mundið, tá mótmælta samtykkið var fingið til vega.

# 4. Børn og samtykki

Sambært dátuverndarlógini skulu børn hava eina serliga verju, tí tey vita minni um teir vandar og avleiðingar, ið kunnu vera knýttir at viðgerð av persónupplýsingum. Um ein dátuábyrgdari skal viðgera persónupplýsingar um børn, eigur viðkomandi tí at vera serliga varugur við, um børnini skilja, hvat samtykki verður givið til, og um tey eru før fyri at geva samtykki.

## 4.1. Møguleikin hjá børnum at geva samtykki

Tá ein dátuábyrgdari ætlar at viðgera persónupplýsingar um eitt barn, grundað á samtykki, skal dátuábyrgdarin umhugsa, um barnið sjálvt kann geva samtykki, ella um samtykki skal fáast til vega hjá tí, sum hevur foreldramyndugleikan.
Um barnið sjálvt kann geva samtykki, er ein ítøkilig meting av, hvussu búgvið barnið er. Dátuábyrgdarin skal ítøkiliga meta um, um barnið er nóg búgvið og hevur nóg nógva fatan til sjálvt at geva samtykki. Vanliga er eitt 15 ára gamalt barn nóg búgvið til at kunna geva samtykki sjálvt.

Um dátuábyrgdarin metir, at barnið ikki er nóg búgvið, eigur samtykki at fáast til vega hjá tí, sum hevur foreldramyndugleikan

Tann kunning, sum skal veitast frammanundan, at samtykki verður fingið til vega, skal lagast eftir fatan barnsins. Kunningin skal orðast á einum greiðum og einføldum máli, so barnið kann fata upplýsingarnar.

## 4.2. Samtykki frá børnum í sambandi við kunningarsamfelagstænastur

Kunningarsamfelagstænastur skulu skiljast í samsvari við allýsingina í dátuverndarlógini, § 6, nr. 16. Kunningarsamfelagstænastur, ið eru útbjóðaðar beinleiðis til børn, eru t.d. sosialir miðlar (Facebook, Snapchat, Instagram o.s.fr., men eisini lokal skúla-intranet kunnu verða fevnd), online-spøl og handil á alnetinum av ymsum slag.

Sambært dátuverndarlógini er útboð av kunningarsamfelagstænastum beinleiðis til børn – sum hevur samtykki sum heimildargrundarlag – bara lóglig, um barnið er í minsta lagi 13 ár.

Um barnið er undir 13 ár skal samtykkið verða givið ella góðkent av tí, sum hevur foreldramyndugleikan.

Er barnið yngri enn 13 ár skal dátuábyrgdarin í rímiligan mun  kanna, at viðkomandi, sum hevur foreldramyndugleikan, hevur givið ella góðkent samtykkið. Dátuábyrgdarin skal í sínum royndum taka atlit at tøkari tøkni. Um dátuábyrgdarin hevur gjørt nóg mikið, verður ítøkiliga mett um, í hvørjum einstøkum føri.

Dátuverndarlógin setur almenn krøv til dátuábyrgdarar og dátuviðgerar. At dátuábyrgdarin og dátuviðgerin skulu hava eina váðagrundaða tilgongd til viðgerðartrygd hevur m.a. við sær, at krøvini til trygd eru serliga strong, tá persónupplýsingar um børn skulu viðgerast.

Samtykki frá tí, sum hevur foreldramyndugleikan er ikki neyðugt – heldur ikki, um barnið er undir 13 ár – um talan er um fyribyrgjandi ella ráðgevandi tænastur, sum verða bodnar barninum. Barnið hevur tí møguleika fyri at søkja sær ráðgeving um

alkoholnýtslu ella sálarligar trupulleikar, uttan at tann, sum hevur foreldramyndugleikan, samtykkir.

# 5. Tjekklisti

Tjekklistan kanst tú nýta fyri at meta, um tú sum dátuábyrgdari, fylgir dátuverndarlógini:

- Tú hevur tikið støðu til, at samtykki er best hóskandi viðgerðargrundarlag til at viðgera persónupplýsingar
- Áheitanin um samtykki er greið og týðiliga skilt sundur frá øðrum teksti um keypstreytir og vøruútbering
- Tú heintar altíð samtykki umvegis eina virkna gerð frá tí, ið samtykkir
- Tú heintar ongantíð samtykki umvegis frammanundan avkrossaðum samtykki-puntum ella líknandi
- Samtykkiváttanin er orðað á greiðum og einfaldum máli, sum er lætt skiljandi fyri málbólkin
- Samtykkið nágreinar endamálið við ætlaðu viðgerðini av persónupplýsingunum
- Um tú ynskir samtykki til ymisk endamál, so spyrt tú um serstakt samtykki fyri hvørt endamál
- Navnið á dátuábyrgdaranum er at finna í samtykkitekstinum
- Tú kunnar um møguleikan fyri at taka samtykki aftur
- Samtykki er ikki ein treyt fyri veitan av vøru ella tænastu
- Um tú útbjóðar kunningarsamfelagstænastur beinleiðis til børn undir 13 ár, nýtir tú bert samtykki sum viðgerðargrundarlag, um tað er gjørligt at kanna aldurin á barninum, og tú fært til vega samtykki frá tí, ið hevur foreldramyndugleikan, um barnið er yngri enn 13 ár
- Tú kanst vísa á, hvør hevur givið samtykki, nær samtykki er givið, hvussu tað varð givið, hvat viðkomandi hevur givið samtykki til, og, at samtykki veruliga er givið sjálvboðið
- Tú fylgir regluliga upp, at samtykki framhaldandi hevur áhuga, at upplýsingarnar eru rættar og, at endamálið við viðgerðini ella sjálv viðgerðin ikki er broytt

**Vegleiðing**
© 2020 Dátueftirlitið

Endurprent við kelduávísing er lóglig.

Givið út:
Dátueftirlitið
Reyngøta 33
100 Tórshavn
Tlf: 309100
dat@dat.fo
dat.fo

Dátueftirlitið